LM-090/2023

sev

# Notat. Gagnnýtsla av avlopsorku frá vindi.

Nú landsstýriskvinnan í umhvørvismálum hevur kunngjørt tíðarfesta útbyggingarætlan innan framleiðslu av varandi orku næstu 5 árini við einum vindorkumátti á 136 Megawatt og Effo hevur kunngjørt sína útbyggingarætlan Eysturlund á 100 Megawatt, samstundis sum staðfest verður, at tað er ein vindorku framleiðslumáttur á 60 Megawatt á elskipanini og at í verandi løtu er stórsta lastin í elskipanini uml. 70 Megawatt, so verður samlaði vindorku framleiðslumátturin munandi størri enn samlaða elnýtslan.

Við øðrum orðum eru stór sannlíkindi fyri, um onki annað verður gjørt, at nógv vindoka fer til spillis í elskipanini, tá ið vindur er.

Tað, sum skal til, er at oljurikin orkunýtslu, kann umskipast til «nýggja» elnýtslu, ið ikki ger seg inn á tann verandi elmarknaðin. Ella sagt á ein annan hátt, loysnirnar skulu gerast á slíkan hátt, so sleppast kann undan sonevndari «kanibalismu» á elmarknaðinum.

Um kundarnir, ið hava umrøddu oljunýtslu, skulu fara yvir á elloysnir, so skulu teir aloftast gera munandi íløgur sjálvir. Avbjóðingin er tá, at við vanligum elprísum versnar búskapurin fyri hesa umlegging aloftast munandi.

Við at gera eina marginalgrundaða tilgongd til nevndu «nýggju» elnýtsluna hvat elprísinum viðvíkur fyri eitt fastlagt tíðarskeið, eru sannlíkindini størri fyri, at tað ber til hjá kundanum at avskriva íløguna í hesum tíðarskeiðnum. Tá ið avtalað tíðarskeiðið er runnið, kann kundin so avgera, um hesin vil halda fram í elskipanini til tær vanligu treytirnar, sum allir aðrir kundarnir hava.

Við øðrum orðum er nýtsluendamálið avgerandi fyri, hvør kann vera við í gangnýtsluni av «avlopinum» í elframleiðsluni frá vindmyllum. Og serligar treytir skulu eisini setast fyri at fáa hetta avlop, soleiðis at verandi kundar á onga hátt eru við til at gjalda fyri, at hesir nýggju kundarnir fáa øðrvísi treytir (bíligt, tá ið avlop er til taks).

Hóast ætlanin alla tíðina hevur verið, at tað fyrst og fremst er pumpuskipanin hjá Sev í Vestmanna, ið skal brúka hesa avlops elorkuna frá vindmyllum, so verður tað við omanfyri nevndu útbyggingarleisti ríkiligt av avlopsorku at lata út til ávís virkisøkir undir nærri ásettum treytum, at avloysa partar av teirra oljunýtslu.

Fyri at kunna koma í gongd er neyðugt við einari orðing í elveitingarlógini, sum gevur møguleika av gagnnýta avlopsorku frá vindmyllum, og uttan at hetta ger seg inn á tann verandi elmarknaðin. Í hesum sambandi er umráðandi, at ásett er, hvat hendan avlopsorkan kann brúkast til.

Okkara boð uppá hetta er, at avlopsorka frá vindmyllufrmleiðsluni til serligar treytir verður avmarkað til framleiðslu av heitum vatni til nær-/fjarhita- og

turkingarskipanir, heittvatn og/ella damp til processanlegg, landstreym og PtX-anlegg (t.e. framleiðsla av framtíðar burðardyggum brennievnum til m.a. skipsmotorar, so sum vetni, metanol, ammoniakk o.l.).

Tær serligu treytirnar skulu setast soleiðis, at ongin kostnaður av omanfyri nevndu skipan verður førdur yvir á verandi kundar elfelagsins.

Tórshavn hin 19. apríl 2024
Elfelagið Sev

Hákun Djurhuus, stjóri

sev

**Aðrar viðmerkingar.**

Hjá Sev hevur viðgerðin av hesum evninum higartil verið sum niðanfyri upplýst. Í frágreiðing frá nevndini í Sev, sum verður latin eigarunum á aðalfundi felagsins 19. apríl 2024, stendur hetta brotið:

*«Arbeitt verður við skipan fyri sølu av el frá vindmyllum, ið annars ikki verður gagnnýtt – avlopsel - at selja til einstakar størri brúkarar, ið útvega sær elketil til fjarhita og/ella processhita ella størri hitapumpur til framleiðslu av heitum vatni og/ella dampi, ið verður brúkt til avloysing av nýtslu av olju í hitaveiting og/ella framleiðslu kundans.»*

Hetta evni bleiv viðgjørt á nevndarfundi í Sev hin 9. februar 2024, har samtykt nevndarinnar sær soleiðis út:

*«Nevndin tók undir við tilmælinum frá leiðsluni og samtykti at taka undir við uppskotinum til framgangshátt fyri at áseta ein fyribilspris fyri avlopsel. Harumframt samtykti nevndin, at leiðsla felagsins kann tingast við Elveitingareftirlitið um prís og treytir annars í sambandi við málið og gera uppskot til avtalu um prís og treytir annars fyri at leggja eina endaliga avtalu fyri nevndina at taka støðu til á einum komandi fundi.*

*Harumframt tók nevndin undir við, at í royndartíðini rindar ein slíkur kundi bert fyri kostnaðin at binda í elnetið, men tá royndartíðin er av skal kundin rinda upp til fult íbindingargjald, sum tá er galdandi hjá SEV, umframt at kundin skulu rinda elprís, sum tá er galdandi sambært gjaldsskránni.»*

Hendan samtykt nevndarinnar er ein staðfesting uppskoti til skipan, ið lýst var í brævi dagfest 5. februar 2024 til Umhvørvisstovuna, har biðið var um góðkenning av einari fyribils loysn.

Brot úr svarinum frá Umhvørvisstovuni dagfest 22. mars 2024 ljóðar soleiðis:

*«Áðrenn málið er búgvið til støðutakan er neyðugt at uppskotið til prísskipan verður viðgjørt meira nágreiniliga, eisini við atliti til, hvat ein hóskandi elprísur fyri avlopsel er eftir teimum viðurskiftum, sum eru galdandi fyri føroyska elveitingarøkið.*

*Sum nevnt vilja vit beinanvegin, saman við SEV, fara undir eina endaliga tilgongd við atliti til at koma til eina niðurstøðu innan stutta tíð.»*

Tað hevur ikki verið samskift meira um hetta og enn er ikki nakað avtalað í so máta. Tað framgongur ikki av svarinum frá Umhvørvisstovuni, hvørt heimild er fyri at gera slíka skipan, men sjálvur kundi eg tonkt mær, at elveitingarlógin eigur at rúma og heimila hesum, og at hetta er neyvan til staðar hvørki í verandi elveitingarlóg ella fyriliggjandi uppskoti til broytingar í elveitingarlógini.